

Havila Shipping er eitt av reiðaríunum sum umhugsar at flagga heimaftur til norskt flagg. Mynd: Havila Shipping

# Lógarbroyting ger at FAS-skipanin kann missa nógv skip

**Jógvan Hugo Gardar**

29.05.2015 - 16:06

Oljan.fo

Norska stjórnin hevur í dag lagt fram eina heildarætlan fyri sín sjóvinnupolitikk. Ætlanin umfatar millum annað spurningin um øll tey skipini sum norsk reiðaríir eiga, og sum sigla í norskum sjógvi, men við fremmandum flaggi.

Í orðaskiftinum í Noregi farna árið hevur verið leita eftir eini skipan sum ger at norsk reiðarí ikki velja til dømis føroysku FAS-skipanina. Nú sær út til at tað er eydnast norsku stjórnini at finna neyðuga lykilin, ið fær norskar reiðarar til at flyta skipini heimaftur frá millum annað skipaskrasetingum á Bahamas og Føroyum.

Av teimum skipunum sum eru undir FAS-skipanini, og hava norskan eigara, so eru fleiri sum í dag sigla innanskerðs í Noregi. Broytingin sum nú er á veg rakar beinleiðis FAS, tí ætlanin er at broyta lóggávuna, so skip sum eru skrásett undir norsku altjóða skipaskrásetingini (NIS), tey skulu kunna virka innanskerðs í Noregi og á norska landgrunninum. Í dag kunnu NIS-skip ikki átaka sær uppgávur sum gera at tey sigla millum norskar havnir. Nógv av hesum skipunum eru tey í dag skrásett í FAS ella øðrum altjóða skipaskrásetingum.

Norskir reiðarar hava seinnapartin staðið í kø fyri at siga at nýggi politikkurin hjá norsku stjórnini ger at tey nú fara at flagga skip heimaftur.

Norska tíðindastovan NTB og Norske Reiðarafelagið hava seinnapartin almannakunngjørt hendan listan við reiðaríum sum siga at tey nú flagga skip heimaftur. Sagt verður ikki í hvørjum londum hesi eru skrásett í dag:

* Solstad Offshore: 7 skip

* Havila Shipping: 1 skip

* Eidesvik Offshore: 1 skip

* Hagland Shipping: 5 skip

* Olympic Offshore: 4 skip

* REM Offshore: 3 skip

* Østensjø Rederi: 1 skip + 1 nýtt skip sum reiðaríi skal hava í mars 2016

* Misje Rederi: 1 skip (og talan kann vera um 12 skip til samans)

Hetta eru fyribils tey reiðaríini sum hava boða fra at broytingin kemur at gera at tey flagga heimaftur.

Skipanin hjá FAS ger at ikki er møguligt at síggja hvussu nógv skip sum hava norskar eigarar, tí letur seg í løtuni ikki gera at siga hvussu umfatandi avleiðingarnar vera fyri FAS.